# Fleiri favorittar snávaðu

**Úrslitini í 1. deild bera við sær, at tað nú bara er VB/Sumba, sum hevur fulla úrtøku**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hesa ferð vóru fleiri av úrslitunum í næstbestu fótbóltsdeildini óvæntað. Fáur mundi rokna við, at KÍ skuldi vinna í Gundadali og at B68 skuldi vinna í Runavík, og uppaftur færri mundu rokna við, at oddaliðið TB einki skuldi fáa burturúr í Leirvík.

Úrslitini í dag bera við sær, at VB/Sumba nú er einasta liðið, sum hevur fulla úrtøku. VB/Sumba er oddalið saman við TB, sum hevur spælt ein dyst fleiri enn VB/Sumba. Suðuroyar-feløgini hittast á Sevmýri mikukvøldið, tá ið tað er fult umfar í næstbestu deildini. Umframt TB-VB/Sumba sær skráin soleiðis út: AB-NSÍ, 07 Vestur-Víkingur, B68-HB og EB/Streymur-KÍ.

Úrslitini bera eisini við sær, at NSÍ eigur einasta liðið í 1. deild, sum ikki hevur vunnið, og sum ikki hevur fingið stig. Hesa ferð tapti NSÍ Kristi himmal-ferðardag 5-0 í Gundadali ímóti HB, og so tapti NSÍ heimadystin ímóti B68 4-1, eftir at NSÍ í 1. hálvleiki hevði verið á odda.

Merkisvert í uppgerðini millum NSÍ og B68 var tað, at gamla B68 verjukempan Edmund Jacobsen (46 ár) var við alla tíðina, og at Aksel Højgaard (49 ár), sum skifti seg sjálvan inn síðstu løtuna. Tá spældi hann saman við yngra soninum Artur Højgaard (18 ár). Eldri sonur hansara, Jóhan Dávur Højgaard, var í B68 miðverjuni á Formula liðnum, sum sunnudagin spældi ímóti KÍ.

Mest áhugaverdu upp-gerðirnar hesa ferð vóru suðuroyarliðini partar av. Í Leirvík tapti TB 1-0 ímóti Víkingi. TB spældi nógv við longum sendingum, og Víkingur dúvaði upp á snarálop. Eitt stórt korter eftir steðgin skoraði heima-liðið sigursmálið. Uppspæl-ið til málið var fínt, og tá ið bólturin varð lagdur innfyri av baklinjuni í vinstru, taklaði Finnur Justinussen hann í netið við handara stólpan. Merkisvert var tað, at hóast talan var um nógvar tættar støður, so hevði dómarin bara eina ferð gula kortið á lofti.

Hóast VB/Sumba hevði lotið ímóti í 1. hálvleiki, so eydnaðist tað heimaliðnum at leggja seg framum ímóti AB, tá ið tíggju minuttir vóru farnir. Málskjútti var Jón Krosslá Poulsen.

Í 1. hálvleiki hevði AB fleiri hornaspørk, uttan at tað eydnaðist at fáa nakað burturúr, og í 2. hálvleiki eydnaðist tað VB/Sumba at halda tørn um leiðsluna. Hetta var onnur ferðin, at AB spældi á útivølli ímóti einum av hinum liðunum, sum hava møguleika at flyta upp, og hetta var onnur ferðin, at AB einki fekk burturúr á útivølli.




*AB hevur tvær ferðir tapt á útivølli móti liðum, sum argjamenninir kappast við um uppflyting. Hesa ferð vann VB/Sumba tepran sigur á gestunum*

*Mynd: Fa. Talgilt*

## Real Madrid tók gullið

Real Madrid tryggjaði sær í gjárkvøldið sær spanska meistaraheitið, tá ið teir vóru á vitjan hjá Osasuna. Fyrri hálvleikur endaði mál-leysur, og vónirnar hjá Real Madrid at gerast meistari fingu eitt skot fyri bógvin, tá ið Fabio Cannavaro fekk sítt seinna gula kort og varð útvístur bara 18 sekund inn í seinna hálvleik. Dysturin sá leingi út til at gerast málfátækur, men í 83. minutti eydnaðist tað Francisco Punal at leggja Osasuna á odda við brotssparki. Tríggj-ar minuttir fyri leiklok javnaði Arjen Robben, og bara tveir minuttir seinni tryggjaði Higuain Real Madrid sítt 31. meistaraheiti, tá hann skoraði til endaliga úrslitið, sum harvið gjørdist 2-1 til Real Madrid.





Endurlýsing

Starvsfólkaleiðari

Av tí at verandi starvsfólkaleiðari fer í annað starv, verður við hesum søkt eftir nýggjum starvsfólkaleiðara at seta sum skjótast. Rætta fólkinum kunnu vit bjóða eitt avbjóðandi og áhugavert starv.

Arbeiðsøki
Uppgávan er at leiða og standa fyri starvsfólkadeildini og áhaldandi menna starvsfólkaøkið hjá Landsverki. Tað er somuleiðis uppgávan at syrgja fyri, at vit hjá Landsverki altíð hava nøktandi HR og KT-amboð.

Starvsfólkadeildin tekur sær av bæði starvsfólkarøkt og umsiting, herundir øllum tí, sum hevur við setanarviðurskifti at gera, starvsfólkamenning, skrivstovuumsiting, frítíð, arbeiðstíð og lønarviðurskifti. Í hesum sambandi er tað eisini ein uppgáva at gera yvirskipaðar mannagongdir og reglur. Tú verður partur av leiðslubólkinum, har tíni sjónarmið kunnu gera seg galdandi.

Førleikakrøv
Sóknast verður eftir fólki við viðkomandi hægri útbúgving og royndum innan leiðslu og KT. Stórur dentur verður lagdur á góðar persónligar eginleikar, og vit rokna við, at viðkomandi hevur góð samstarvsevni, er førur fyri at eggja øðrum til og at ganga undan, er miðvísur, arbeiðir skipað og kann geva sítt íkast til at menna arbeiðsplássið.

Setanarviðurskifti
Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Umsókn
Umsókn við prógvum og lívsgongdarlýsing (CV) skal vera skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 14. mai 2008.
Merkið brævbjálvan „Starvsfólkaleiðari". Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Fleiri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Oyvindi Brimnes, stjóra, á 540 801 ella ob@lv.fo.

SENDISTOVAN

*Landsverk er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallarmál, herundir tyrlupallar.*

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn,
Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land